

Tinghúsvegur í Havn hoknar





Fleir hús vórðu tikin av grundini í jólaódnini í 1988. M. a. hesi sethúsini í Djóna í Geilsgøtu í Havn

eisini eftir eina ekstrema ódn tann 27. februar, kom Tryggingarsambandið Føroyar, sum Tryggingarfelagið Føroyar æt inntil tá, við síni "pakkatrygging". Tað er, at í eini pakkatrygging er alt góðs og øll virðir tryggjað undir einum. Tað loysti seg betur hjá tryggingini og viðskiftafólkunum. Nú var lagt upp fyri heimsins harðastu ódnum, skuldi tað hent, at tær høvdu hug at herja á aftur.

## Bløðini skriva

Tollaksmessudag í 1988 skrivaði Sosialurin millum annað um Jólaódnina, at " ... gomul fólk minnast ikki verri vind enn tann, sum herjaði landið mikukvøldið og hósnáttina. Stórur vindskaði um alt landið. Hundraðtals hús og bilar illa farin (...) Á Tvøroyri fór takið av sjúkrahúsinum um ellivutíðina mikukvøldið. Og umleið somu tíð fór eisini takið av heilsøluni hjá Poul Hansen á Hvítanesi (býlingur á Tvøroyri, red.) ..."

Dimmalætting skrivaði henda sama tollaksmessudag í grein hjá sjónvarpsmanninum Tórði Mikkelsen undir yvirskriftini Skaðaódn uttan fólkaskaða: "Mangur ein føroyingur fekk ikki blund í eyguni gjáranáttina, sum óveðrið leikaði í. Eingin veit at siga frá slíkum stormi – sjálvt ikki gomul fólk. Á flogvøllinum í Vágum var vindurin eitt skifti so nógvur, at vindmátarin, sum vísir upp til 60 m/s fór í botn og sprongdist. Á Borðuni varð mált upp til 50 m/s. Kring alt landið vóru sløkkilið og bjargingarlið í arbeiði alla gjáranáttina og langt út á gjárdagin. Allir sjúklingarnir á deild 2 á Landssjúkrahúsinum (2. hædd á Dronning Alexandrines Hospital) vórðu fluttir yvir á røktarheimið í góðari tíð, áðrenn stórur partur av tekjuni reiv. Annars hevur stórur skaði verið um alt landið. Heili hús fóru í sor, og nógvar yvirtromir rivu (...) Mobiltelefonin, sum fleiri í landinum longu hava ognað sær, kom rættiliga til sín rætt í óveðrinum. Hon varð nógv nýtt sum neyðtelefon, tá allar hinar sviku ..."

## Tilbúgvingin dagførd

So at siga øll bjargingarfeløg í Føroyum vórðu dagførd eftir Jólaódnina. Hon brast sjálvandi



Við Landavegin í Havn knústi ódnin mangt, ið stóð fyri henni

óvæntað á, og føroyingar fingu ein slíkan skelk, at teir vildu ikki standa ótilbúnir aftur. Tað hevur eisini víst seg at halda heima.

Jólaódnin var so øgilig, at útlendskir fjølmiðlar fylgdu við og fingu frásagnir úr Føroyum. Hjá veðurfrøðingum um allan heim var ódnin ein "dýrgripur". Hetta var eitt ótrúligt, óhoyrt fyribrigdi, og teir grundaðu um, hvørt hetta kanska var tann harðasta ódnin nakrantíð í søguligari tíð um ikki annað.

Jólaódnin fór eisini ógvuliga illa við viðarlundunum í Føroyum. Nógvastaðni í landinum er so mikið grunt, at røturnar standa seg illa.

Ódnin mikukvøldið 21. desember og hósnáttina 22. desember í 1988, mundi forkomið viðarlundunum. Plantasjan í Havn var fyri veruligum sorgarleiki. Trøini stóu tøtt og stinn, men dagin eftir ódnina lá nærum alt slættað niður summastaðni. Á einum stað á Varðagøtu sást heilt oman á Gundadalshøllina.

Eisini hinar viðarlundirnar fóru illa. Tær minkaðu ófyrigeviliga nógv eitt nú á Selatrað, í Kunoy og í Trongisvági.

Viðarlundirnar vórðu sjúklingar, ið kravdu mikla røkt. Nú í 2008, júst 20 ár eftir Jólaódnina, hevur Skógrøkt Landsins fingið tær uppaftur av sjúkraleguni. Tær eru í roynd og veru vakrari og betur fyri enn nakrantíð.

Ringasta ódn í Føroya søgu fekk fólkið tilbúgvið, og landið tykist vera tilbúgvið alla tíðina.

Sum neyðugt er, tí veðrið er vorðið øðrvísi enn í 1988.

Tað er vorðið tættari millum ódnirnar, men tað veit manningin á Miðlabreytini so lítið um, tí hon var ikki fødd fyrr enn í 1992, tá ið føroyingar rættiliga fóru at búgva seg til tær heilt ekstremu ódnirnar.

Gleðilig jól frá Miðlabreytini í 10. flokki í Tórshavnar kommunu!

*Miðlabreytin, 10. flokkur*
*í Tórshavnar kommunu*